## Bergen verjir seg

Á hvørjum ári koma útlendskir kjarnorkukavbátar til Haakonsvern nærhendis Bergen, og nú hevur kommunan gjørt av at verja borgararnar, skuldi eitt óhapp hent við einumkjarnorkureaktori. Eftirtilmælifráheilsumálaráðnum hevur Bergen kommuna keypt 70.000 jodtablettir, sum tilbúgvingin skal hava á goymslu, skuldi eitt óhapp hent. Samstundis er avgjørt at hava jodtablettir á goymslu í Stavanger, hagar kjarnorkukavbátar eisini koma.

## Dýr bátapláss

Tey, sum halda, at tað er dýrt at hava bát liggjandi í einum bátahyli ella við bátabrýr í Føroyum, kunnu fegnast um, at tey ikki skulu hava bátin liggjandi í Oslo. Sunnmørsposten veit at siga, at herfyri fekk ein maður eina hálva mió. krónur í lumman, tá hann seldi rættindini til at hava ein bát liggjandi í Solvikbátahavnini í Oslo. Havnarfútin sigur seg ikki hava hoyrt um so dýrt pláss fyrr, men 400.000 krónur er ikki óvanligt, sigur hann.

# Várróðurin fer at halla

**Uppi á landi høvdu vit ein góðan várdag í gjár, men hjá teimum, sum skuldu søkja sjógvin norðanfyri, vigraði einki serligt. Tí lógu flestu bátarnir bundnir við bryggju, og nú vóna menn, sum liggja á Eiði, at okkurt gott fer at spyrjast burtur úr teimum seinastu døgunum av vártíðini**

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Við bátabrúgvarnar á Eiði í gjár lógu flestu avbygdarbátarnir og bíðaðu eftir líkindum, nú roknast má við, at norðhavstíðin, sum aftur í ár hevur roynst svikalig, rættiliga er farin at styttast. Onkuntíð kundu upp í 100 bátar leggja veiðina upp á Eiði í eitt kvøld*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað var ikki nógv lív í fram við bryggjukantinum á Eiði seinnapartin í gjár, tá Sosialurin var fram við.

Veðrið var gott, turt og sól. Kortini royndist vestliga lotið heldur frískligt hjá bátunum, sum enn liggja á Eiði og bíða eftir onkrum snelludegi aftrat. Á Mølini sást tú eisini, at sjógvurin ikki var slættur, og tað breyt heilt fitt upp á land. Streymurin er hálvharður, og menn siga, at hann hildnast væl – ja, ov væl til útróður ein slíka dag, sum í gjár.

Flestu av teimum umleið 20-25 bátunum, sum eru komnir norður til Eiðis at rógva út við snellu á Norðhavinum, lógu bundnir við bátabrúgvarnar í gjár. Bert tveir bátar loystu, og annar av hesum var Langanes av Strondum, sum var aftur at landi nakað út á seinnapartin, tá hann lotaði so frískliga vestaneftir. Ein maður var við Langanesi, og hann hevði fingið eini 200 pund í eina løtu.

### Fáir útróðrarbátar

Á ytru síðu við bátabrúgvarnar lógu flestu avbygdarbátarnir og bíðaðu eftir líkindum, nú roknast má við, at norðhavstíðin, sum aftur í ár hevur roynst vánalig, rættiliga er farin at styttast.

Sonni Kallsoy, sum hevur róð út at kalla alt sítt lív, sigur, at tá ið várútróðurin av Eiði var upp á tað besta, plagdu heilt upp í 100 bátar at leggja fiskin upp á Eiði eftir loknan dag.

- Tað var so javnan, at einir 50-70 bátar løgdu veiðina upp her hjá okkum, sigur hann.

Seinastu árini hevur várróðurin sum heild roynst heldur svikaligur, og tí hevur áhugin hjá útróðrarmonnum at liggja á Eiði og aðrastaðni norðanfyri heldur ikki verið tann stóri.

- Vit plagdu at siga, at várróðurin byrjaði norðanfyri um hálvan februar, men fingu bátar fisk fyri ta tíð, plagdi talið av bátum at veksa skjótt. Í vár man talið vera eitt tað minsta, sum hevur verið í fleiri ár.

### Frægast í løtuni

Sonni Kallsoy, sum eigur útróðrarbátin Barm, ið roynir við línu, heldur, at tann tíðin, sum hóast alt hevur roynst frægast hjá snellumonnunum í vár, var seinasta vika.

- Í síðstu viku viðraði sum heild hampiliga væl, og menn fingu nakað av fiski.

Hann vísir á, at onkur einsamallur maður, sum kortini hevði fleiri snellur í bátinum, kom upp í eini 1500 pund, og nógvir bátar lógu millum 600 og 1000 pund.

- Hetta er nú ikki so nógv at tosa um, men kortini tað frægasta, sum verið hevur um okkara leiðir higartil í vár, sigur útróðrarmaðurin.

### Rækjur á beitu

Sonni veit at siga, at teir, sum fingu frægast í síðstu viku, egndu rækjur á beituhúkarnar, og hetta vísti seg at rigga betri enn við berum beitum.

- Sum eg havi skilt, hava fleiri egnt rækjur í seinastuni, sigur hann.

Nú so langt er útliðið, er ilt at spáa um, hvussu hesin seinasti mánaðin av vártíðini man fara at roynast.

- Vit plaga at siga, at vártíðin byrjar um hálvan februar og er liðug um okkara leiðir um hálvan apríl. Seinni plagar fiskurin at taka seg uppaftur vestanfyri. Tað hevði tó verið hugaligt hjá snellumonnum, sum liggja her norðuri, um teir fingu nakrar góðar dagar, áðrenn vártíðin rennur undan.

Sonni sigur, at fáir bátar úr Suðuroy hava verið á Eiði í vár í mun til undanfarin ár.

- Har suðuri siga útróðrarmenn, at teir drepa ikki livandi tíðliga í vártíðini, og tí kunnu teir eins væl halda seg norðanfyri um várarnar.

### Bara lína

Sonni Kallsoy hevur altíð verið nógv á báti, og hann hevur verið útróðrarmaður tað mesta av sínum lívi.

- Mær dámdi væl at vera á floti longu, tá eg var eini 5-6 ára gamal, og mær dámar framvegis væl at rógva út – ikki minst, nú man er sín egni harri, sum hann tekur til.

Útróðrarbáturin hjá Sonna er ein 37 fót stórur íslendskur Gáski-bátur.

- Báturin er longdur á verkstaðnum hjá SD-Beding í Runavík, og hann er royndur í øllum veðri.

Barmur roynir bara við línu, eisini í vártíðini. Sonni heldur ikki, at tað loysir seg hjá teimum at leggja um, hóast hann í sínari tíð keypti snellur, tá hann keypti bátin. Hann heldur, at hetta var ein vánalig íløga.

### Konan í skúri

- Vit eru tveir mans umborð og kona mín, Jenny, er í skúrinum. Í landi verður línan rikin um, og húkarnir settir á stokkar. Síðan verður sett gjøgnum trakt, tá farið verður til útróðrar.

Í vártíðini egnir Barmur bara gággu, sum teir keypa frá manni, ið roynir eftir gággu á Funningsfirði.

- Egnir tú ikki gággu hesa tíðina av árinum, fært tú einki, sigur útróðrarmaðurin, Sonni Kallsoy.

